# Hjalti er við Kyndli

Talan er ikki bara um vánalig tíðindi til Kyndils-fólk undan steypafinaluni. Flestum kunnugt verður Høgni Klein ikki við á vøllinum, eftir at hann breyt hondina í hálvfinaluni móti StÍF. Hinvegin verður Hjalti M. Jacobsen við í hópinum. Hjalti hevur í ár verið burtur í lestrarørindum, men hann kemur heim til finaluna, og er tað uttan iva ein góður styrkum, sum eisini kann loysa av á plássinum sum spælskipari, um beinini hjá Jónleif Sólsker ikki halda til samfullar 60 minuttir.



# Einki lusk við Færø

Tað er einki lusk við, at Brøndby hevur gjørt sáttmála við føroyska verjuspælaran Odmar Færø. Tað skrivar heimasíðan bold.dk. Odmar Færø var í heyst til royndarvenjing í AC Horsens, og har stóð hann seg væl. Venjarin í Horsens tá var Kent Nielsen, sum rósti Odmar Færø til skíggja. Eingin avtala spurdist burturúr, men nú Kent Nielsen er farin til Brøndby at verða venjari, hevur hann syrgt fyri, at Odmar Færø fær sáttmála við Børndby. Í AC Horsens siga tey, at einki løgið er við hesum. Kent Nielsen hevur spælt við opnum kortum allatíðina, og tað var leiðslan í AC Horsens, sum ikki vildi gera avtalu við Odmar Færø. - Brøndby hevur meira pengar at arbeiða við og kunnu lata hann spæla á næstbesta liðnum, sigur Jesper Hansen, ítróttarstjóri í AC Horsens, við bold.dk



## Steypafinalur - menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1985<br>VÍF-Kyndil<br>33-24 | 1990<br>Kyndil-VÍF<br>19-18 | 1995<br>Kyndil-StÍF<br>32-24 | 2000<br>Kyndil-Neistin<br>22-20 | 2005<br>StÍF-VÍF<br>28-23 |
| 1986<br>Kyndil-KÍF<br>24-23 | 1991<br>Kyndil-Neistin<br>22-17 | 1996<br>Kyndil-VÍF<br>29-18 | 2001<br>StÍF-VÍF<br>32-29 | 2006<br>StÍF-VÍF<br>24-22 |
| 1987<br>Kyndil-Neistin<br>21-14 | 1992<br>Neistin-Kyndil<br>15-14 | 1997<br>VÍF-Kyndil<br>25-21 | 2002<br>StÍF-Neistin<br>30-28 | 2007<br>StÍF-VÍF<br>26-25 |
| 1988<br>VÍF-Kyndil<br>16-15 | 1993<br>VÍF-Neistin<br>22-18 | 1998<br>H71-Kyndil<br>23-20 | 2003<br>Kyndil-StÍF<br>26-25 | 2008<br>Kyndil-StÍF<br>28-23 |
| 1989<br>VÍF-Kyndil<br>21-19 | 1994<br>Neistin-VÍF<br>25-24 | 1999<br>VÍF-StÍF<br>24-23 | 2004<br>StÍF-H71<br>34-30 | 2009<br>Neistin-Kyndil |

# Skulu vera svangir

**Spælandi venjarin hjá Neistanum hevur roynt tað mesta sum spælari. Men hóast hetta, so er svongdin eftir at vinna tann sama. Og hann setir álitið á, at spælarar hansara eru minst líka svangir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin er ikki akkurát hondbóltsliðið, sum hevur vunnið flestu steypaheitini á manssíðuni. Seinasti steypasigurin liggur afturi í 1994.

Spælandi venjarin hjá liðnum, Ingi Olsen, hevur tó roynt lutin oftari enn so nógv onnur. Sum spælari hevur hann fleiri ferðir verið við VÍF í finaluni, og sum venjari sat hann á beinkinum, tá Neistin seinast vann kvinnufinaluna.

Tí kennir hann karmarnar betur enn tey flestu, og hann staðfestir, at ein av hansara uppgávum leygardagin er at tálma fjálturin, sum annars kann raka spælararnar ein slíkan dag.

- Tað eru jú serligar umstøður kring ein slíkan dyst. Sjónvarpið sendir beinleiðis, og bæði bløð og miðlar annars gera nógv burturúr. Og við nýggja hondbóltsgólvinum at spæla á er eisini sjónligur munur á til ein slíkan dyst, sigur Ingi Olsen.

- Leikluturin hjá mær er tó at fáa spælararnar at hugsa um hetta sum ein og hvønn annan dyst. Tað snýr seg altso um ein dyst upp á 60 minuttir, har vit sum spælarar skulu avgera tingini á hesum somu 20 ferðir í 40 metrunum, og so mugu vit halda fokus á tí.

*Tit hava bæði vunnið og tapt móti Kyndli í vetur. Hvat slag av dysti roknar tú við, at vit koma at síggja í mansfinaluni?*

- Finaludystir eru ofta ringir at forútsiggja. Bæði liðini fyrireika seg ótrúliga væl, og talan verður ofta um javnar dystir. Og tað rokni eg eisini við, at tað verður hesaferð. Taktiskt verður talan helst eisini um spennandi, og tað verður helst hips um haps, hvør fer avstað við tí. Men vit ætla so at gera okkara til, at tað skal eydnast.

*Og hvat skal rigga serliga væl hjá tykkum, um tað skal eydnast?*

- Vit hava havt tað heldur stríggið í verjuni, og tað skal rigga líka væl, sum tað hevur gjørt teir báðar seinastu dystirnar. Í álopinum hevur tað riggað betur og betur hjá okkum, men í dystunum hava vit havt nøkur útfall, har vit tapa løtur av dystinum stórt. Sleppa vit undan tí, so skuldi staðið hampuliga væl til, haldi eg, sigur Ingi Olsen, sum helst sjálvur verður annar av heilt drúgvu vetarunum á vøllinum leygardagin.

# Er framvegis stuttligt

**Fleiri ferðir hevur Jónleif Sólsker sagt, at seinasti dysturin stóð fyri framman. Í mars mánaði fer hann um tey 43 árini, men enn er stuttleikin tann sami, heldur spælskiparin hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skaðin, sum Høgni Klein fekk í hálvfinaluni móti StÍF, hevur skert Kyndilsliðið. Hinvegin er Kyndil framvegis í teirri hepnu støðu, at liðið hevur ein framúr spælskipara í Jónleif Sólsker. Hóast árini nærkast teimum 43, er hondbóltshøvdið framvegis skjótari enn hjá flestu øðrum. Og sjálvur um talan langt ífrá er um hansara fyrstu finalu, so er spenningurin undan leygardegnum stórur.

- Kanska er mann meira róligur, enn mann var fyrr. Men eg trúgvi nú ikki, at tú setir teg upp á stórt øðrvísi hátt, enn eg annars havi gjørt.

*Tá kappingarárið byrjaði, varð tosað um, at Kyndil hevði trupult við yvir høvur at manna lið. Høvdu tit tá nakra vón um, at tit nú í februar mánaði skuldu standa í finaluni?*

- Nei, tað høvdu vit so avgjørt ikki. Vit høvdu lítið og einki fólk, tá vit byrjaðu kappingarárið, og byrjanin í landskappingini var serstakliga vánalig. Men vit mentu okkum sera væl, og steypakappingin byrjar jú seinni, so tað var kanska nóg so heppið hjá okkum, at vit slóu til, akkurát tá vit skuldu. Og vit eru sjálvandi øgiliga glaðir fyri, at vit eru endaðir í finaluni.

- Tað er serliga verjuparturin, sum er blivin betri, og hann skal eisini rigga leygardagin, sigur Jónleif avgjørdur.

*Sjálvur ert tú farin nakað um tey 40. Verður hetta seinasta finalan, at tú ert á vøllinum?*

- Hatta er ein góður spurningur, men eg tori ikki at svara. Eg havi fleiri ferðir sagt, at eg skal gevast, men so byrji eg at venja aftur, og tað gangi eg 100% uppí tað. So tað má tíðin vísa. Eg eri so heppin, at eg eri sloppin undan ov nógvum skaðum, so eg haldi bara, at eg sigi, at eg taki eitt ár í senn, sigur veteranurin hjá Kyndli at enda.

Og so kann sum eitt kuriosum nevnast, at Jónleif væl kann vera við til at skriva søgu leygardagin. Tað man í øllum førum ikki vera ofta, at faðir og sonur spæla á sama liði, men tað ger Jónleif saman við elsta soninum, Andreas, ið spakuliga er við at bíta seg fastan á Kyndils-liðið.